LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

**Løgtingið**

**Svar**
**uppá**

**skrivligan fyrispurning nr. 52/2020 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Jóhannis Joensen, løgtingsmanni, um at forða útlendingum at keypa fastogn í Føroyum**

**Fyrispurningurin var soljóðandi:**

1. Hevur løgmaður ætlanir um at forða útlendingum at keypa fastogn í Føroyum?

2. Um so er, nær kunnu vit so vænta, at ásetingar, sum forða hesum, verða settar í verk?

**Svar:**

**Til nr. 1**

Eg eri sannførdur um, at vit eiga at forða fyri, at útlendingar fáa møguleikan at keypa nógva jørð og fastogn inn undir seg, fyri síðani at lata tey standa óvirkin og órøkt.

Eg haldi, at endamálið við at áseta reglur á hesum økinum eigur at vera, at vit onkursvegna tryggja okkum, at tey, sum eiga fastogn í Føroyum, hava tilknýti til Føroyar. Eisini er neyðugt at byrgja uppfyri, so at útlendingar ikki eiga alt ov nógvar fastognir í ávísum økjum í landinum. Hinvegin mugu vit heldur ikki seta óneyðugar forðingar fyri útlendskum vinnuvirksemi í Føroyum.

Síðani februar mánaða í ár hevur Løgmansskrivstovan arbeitt við málinum um møguleikan hjá útlendingum at keypa fastogn í Føroyum. Tað eru enn ivamál, sum støða skal takast til saman við øðrum myndugleikum, áðrenn uppskotið verður liðugt.

**Til nr. 2**

So skjótt arbeiðið við lógaruppskotinum er liðugt orðað, verður farið undir eina politiska viðgerð. Eg vænti, at lógaruppskotið kann verða sent til ummælis fyrst í komandi ári.

Í Tinganesi, 9. desember 2020

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tel. +298 306000 · Fax +298 306015 · info@tinganes.fo · www.tinganes.fo